# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Klandur og stríð

Klandur og stríð eyðkennir og hevur altíð eyðkent føroyskan politikk. Tað er lættari sagt enn gjørt at greina orsøkirnar til nógva klandrið. Tað eru ivaleyst ymiskar orsøkir til hesa støðu, og tað einasta ein kann loyva sær at staðfesta er, at klandur er ikki nakað, sum er okkum føroyingum íborið frá skaparans hond. Tað kann sostatt vera nakað við sjálvari politisku skipanini, sum elvir til klandur og sum myndar fortreytir fyri klandri heldur enn fyri politiskum semjum. Kanska hevur hetta nakað at gera við, at vit føroyingar tykjast ongantíð kunna semjast um okkara ríkisrættarligu støðu og tí gongur tað tjóðskaparliga stríðið sum ein støðug politisk afturundirgerð, sum órógvar politiska gerandisdagin.

Aðrar orsøkir kunnu vera, at samfelagið er lítið, og politikkararnir eru sera nær fólki og vinnu. Hetta átti at verið ein stórur demokratiskur fyrimunur, men hetta kann eisini vera ein trupulleiki, tí dagliga trýstið verður lutfalsliga stórt. Stutt er millum partarnar og eingin ivi er um, at hetta kann elva til trýst, og tí fúka ákærurnar um vina- og kenningapolitikk støðugt í politisku luftini. Ein onnur orsøk til nógva politiska klandrið kann vera, at vit halda fast við meirilutastjórnir – við samgonguleistin. Ein stjórn ella eitt landsstýri, ið byggir á ein fastan samgongumeiriluta, kann geva politiskan stabilitet, ið tryggjar tann arbeiðsfrið, ið er ein neyðug fortreyt fyri góðari politiskari stýring og leiðslu av samfelagnum. Við góðari politiskari leiðslu hugsa vit um eitt politiskt stýri, ið tekur fyrilit fyri vælferð borgarans og tryggjar vinnuni góðar karmar. Góð politisk leiðsla tryggjar demokratiskar, góðar og neyðugar politiskar avgerðir, sum hava undirtøku í einum breiðum meiriluta í fólkinum.

Men tað er ikki givið, at hesi fyrilit verða tryggjað best við eini meirilutastjórn. Vit hava í Europa vælvirkandi demokratiskar minnilutastjórnir, ið stýra við skiftandi parlamentariskum meirilutum, alt eftir hvørji mál, ið talan er um. Henda skipan elvir í sjálvum sær til politiskt samstarv millum allar ábyrgdarfullar politiskar flokkar, meðan ein stjórn, ið situr við einum tryggum parlamentariskum samgongumeiriluta, kann elva meira konfrontatión enn til samstarv.

Mong fegnaðust um Føroyar sum eitt valdømi, tí hildið var, at hetta fór at geva eitt betri politiskt veðurlag. So var ikki. Politiski gerandisdagurin er vorðin eyðkendur av persónligum markeringum. Eitt er, at hesar markeringar ganga út yvir álvarsemi og virðing. Annað og verri er, at markeringarnar elva til klandur og sínamillum misálit millum tingfólk, millum flokkar og ikki minst innanflokka. Í skrivandi stund er tað klandrið um svartkjaftin, ið er komið í hæddina, og tá vit koma í handlarnar, er klandrið møguliga av fyri hesaferð. Men politiska støðan er óviss, og bert eitt tykist vist, at næsta klandrið er beint framman fyri stavn. Hetta er ikki gott fyri land og fólk.

**Sosialurin**

# Ein innspræning av saltvatni til Tjóðveldi

**EDMUND JOENSEN**
løgtings- og fólkatingsmaður



Samstundis, sum Ríkisfelagsskapurin enn eina ferð vísir seg at vera ein vinnarafelagsskapur, fløkist Tjóðveldi í síni egnu Misskiltu Nationalismu og hevur mist fótafestið. Tí leitar formaður floksins eftir einari nýggjari tjóðskaparrørslu, meðan harðmæltasti tingmaður landsins brølar um ein nýggjan Jólafund

Politiski leikurin í Tjóðveldi seinastu vikurnar hevur verið undirhaldandi og samstundis tragiskur at fylgt. Tragikomiskur.

Fyribils niðurstøðan er, at Tjóðveldi í hesum døgum man ringjast í síni verstu samleikakreppu í minst 10 ár.

Tá eg ikki geri eina endaliga niðurstøðu, er tað tí, at eg eri sannførdur um, at tragiska sirkussið heldur fram rúma tíð afturat.

### Í kríggj við X Factor

Hvørji eru krepputeknini í Tjóðveldi? Jú, lat okkum fyrst taka eitt av teimum meira undirhaldandi dømunum frá Tórbirni Jacobsen, tingmanni, herfyri.

Tingmaðurin, ið dagliga baðar sær í fjølmiðlaljósi og hevur sum vørumerki at ýla boðskapir av Løgtingsins røðarapalli, gav ilt av sær í sambandi undirhaldssendingina X Factor, har ein ung føroysk kvinna hevur víst sínar sangtalentir.

Stóra føroyska áhugan fyri X Factor skýrir tjóðveldismaðurin "danska kulturimperialismu", og hann ynskir hana hagar, piparið grør. Sendingin er DONSK, og tí er hon vandamikil, skilst.

Ikki nokk við tí. Harðmæltasti tingmaður í Føroyum brølar eisini um, at nú mugu vit hava ein nýggjan Jólafund. Við á leið somu stevnu sum í 1888, nevniliga at verja Føroya mál og siðir.

### Desperatir ynskja Jólafund

Hóast dømið við X Factor er rættiliga óskildugt, vísir tað í grundini væl, hvussu Misskilta Nationalisman virkar: tað, ið er DANSKT, er av tí ónda og skal burtur. Kosta hvat tað vil.

Misskilta Nationalisman er fram um alt undirbrotlig, og hon er tekin um undirlutakenslur mótvegis dønum. Tann álvarsliga avleiðingin av henni er, at hon kann enda við at isolera okkum her norðuri í Atlantshavinum.

Ynskið um ein Jólafund, bendir á, at Tjóðveldi hevur trupulleikar við sínum politikki og samleika. Tí vil flokkurin í síni desperatión styrkja seg við at leita aftur til sína keldu, nevniliga Jólafundin.

### Motorurin er um at steðga

Floksformaðurin og flokstingið hjá Tjóðveldið nakað herfyri fortelja næstu syrgiligu søguna um standin í flokkinum.

Eftir nevnda floksting kom formaðurin við einari niðurstøðu um, at tørvur er á einari nýggjari tjóðskaparrørslu. Hetta er júst sama ynski, sum Tórbjørn Jacobsen hevur, um ein Jólafund – bara sagt á ein annan hátt.

Hetta er sigandi fyri flokkin, sum seinastu 10 árini hevur livað eina baldruta tilveru. Fyrst sum drívmegi í miseydnaðu fullveldissamráðingunum við stjórnina fyrst í hesi øldini. Síðani sum andstøðuflokkur uttan ávirkan. Síðani eina stokkuta stund inni aftur í CHE-hitanum. Og nú úti aftur í myrkrinum, tí ongin kann samstarva við flokkin.

Nú verður so ásannað av hægsta stað, at Tjóðveldi vantar politiskt brennievni. Tangin er tómur. Motorurin er um at steðga. Ella kódna.

Syrgiligt og komist.

### Solidariskur vinnarafelagsskapur

Ein av fleiri orsøkum til frustratiónina og samleikakreppuna hjá Tjóðveldi er, at høvuðsfiggindin – Ríkisfelagsskapurin – enn eina ferð er á sigurskós í Føroyum.

Virðið í Ríkisfelagsskapinum er komið ómetaliga greitt fram seinasta hálva árið, meðan fíggjarkreppa og síðani búskaparkreppa hevur riðið øllum heiminum sum marran.

Hetta hava øll í Føroyum lagt til merkis, og tað pínir í Tjóðveldi.

Í fíggjarliga og búskaparliga ódnarveðrinum hava t.d. allir føroyskir peningastovnar fingið lut í bankapakkunum. Hetta hevur beinleiðis týdning fyri hvønn einstakan føroying.

Innskjótaratrygdin er hækkað heilt upp í 100 prosent. Tað merkir, at øll í Føroyum, sum hava pengar á bók í føroyskum peningastovnum, kunnu sova púra róliga hvørja einastu nátt. Um so alt bankakervið í Føroyum skuldi farið fyri bakka, missir ongin eina krónu.

Og so hava føroyskar fyritøkur nú eisini fingið lut í donsku eksportkredittskipanini, so trygd er aftan fyri t.d. fiskaútflutning úr Føroyum.

Ríkisfelagsskapurin vísir seg enn eina ferð at vera solidariskur og sterkur. Hann er bolverkið, ið tryggjar samfelagið móti fíggjarligum og búskaparligum hóttafalli.

Tað fantastiska er, at Ríkisfelagsskapurin eisini hevur týdning fyri tey, sum ganga upp í Misskilta Nationalismu og prædika fullveldið fyri hvørjum øðrum. Hetta man svíða serliga illa í Tjóðveldi.

### Ein innspræning av saltvatni

Kreppan í Tjóðveldi fer at halda fram, meðan fíggjar- og búskaparkreppan herjar. Tað er í slíkum tíðum, at føroyingar veruliga merkja stóra týdningin av Ríkisfelagsskapinum og trygdarnetinum undir føroyska samfelagnum.

Tá búskapurin fyrr ella seinni vendir – við góðari danskari hjálp – fer aftur at bera til at vinna sær politiskan fyrimun við at nøra um mytuna, sum í stuttum gongur út uppá, at Ríkisfelagsskapurin, blokkurin, Danmark og danir eru rótin til at ilt í Føroyum.

Inntil tá má onkur geva Tjóðveldi eina innspræning av saltvatni, tí í løtuni er standurin meira enn ússaligur.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.